# Gadus kemur í næstu viku

**Nú Skálaberg er seldur, heldur Hanus Hansen seg hava gjørt ein góðan handil**




*Skálaberg hevur sagt Føroyum farvæl og fer í næstu viku vestur um hav*

SKIPAFLOTIN
*Randi Jacobsen*
*Randi@sosialurin.fo*

JFK- Trol hevur selt Skálaberg, og peningurin er komin, sigur Hans Hansen, stjóri í JFK.

Samstundis hevur reiðaríið keypt norska trolaran Gadus.

JFK seldi Skálaberg fyri 190 mió.krónur og fær haraftrat maskinur, sum eru umleið 5 mió. krónur verdar í land av skipinum.

Skálaberg fær nakrar umvælingar í Skagen, har hann liggur, og fer væntandi yvir um hav í næstu viku. Ein føroysk manning skal sigla Skálaberg yvir til Argentina.

Ein onnur manning er farin til Ålesund í Noregi eftir trolaranum Gadus, sum JFK hevur keypt i staðin fyri Skálaberg.

Keypsprísurin r 40 mió. krónur, og umvælingar fyri millum eina og tvær milliónir krónur skulu grast á trolaran.

Gadus kemur væntandi til Føroya í næstu viku.

Hanus Hansen heldur tað vera sárt at skula av við Skálaberg, men hann heldur seg hava gjørt ein góðan handil. Reiðariið fekk 10-15 mió. krónur meira fyri Skálaberg, enn hann kostaði at smíða fyri hálvum sjeynda ári síðan.

- Vit mugu minnast til, at handilin er gjørdur, meðan tað er heimskreppa, sigur Hanus Hansen.

Gadus er ikki so stórur sum Skálaberg og sær ikki líka væl út.

- Men hann er heldur ikki so dýrur at hava sum Skálaberg, sigur Hanus Hansen.

Gadus fær bæði kvotuna hjá Sundaberg og Skálaberg.

# Ótti í Kringvarpinum

Hinar deildirnar í Kringvarpinum bra ótta fyri at missa, um tíðindadeildin skal hava meira pening av samlaðu játtanini til Kringvarpið

Tað er ikki bara á tíðindadeildini í Kringvarpinum, at ófriður valdar. Á hinum deildunum eru tey bangin fyri at missa og fyri uppsagnum. Skal tíðindadeildin hava størri játtan, missa hinar deildirnar av sínum játtanum.

Mikudagin var kunnandi fundur fyri starvsfólkunum á hinum deildunum. programmdeildini,dokumentardeildini og tøknideildini. Eitt umboð fyri starvsfólkini á tíðindadeildini greiddi á fundinum frá, hvat har er hent.

Áður virkaði Kringvarpið meira sum ein eind soleiðis, at vantaði einari deild starvsfólk, bar til at læna fólk frá eini aðrari deild. Nú er skott millum deildirnar, og hvør deildin stríðast fyri sínum.




*Ótryggleiki valdar í øllum húsinum*

# Nýggj fiskiveiðiavtala við Noreg

**Eftir samráðingar í Oslo hava Føroyar og Noreg skrivað undir fiskiveiðiavtalu fyri 2010**

FISKIVINNA
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*



Avtalan gevur føroyskum skipum loyvi til at fiska 293 tons meiri av toski og 121 tons meiri av hýsu í Barentshavinum í ár enn í fjør. Tað svarar til ávikavist 15 og 8 prosent afturat. Upsakvotan í Barentshavinum minkar hinvegin 375 tons, so samanumtikið er talan um eina lítla hækking í føroysku botnfiskakvotuni í Barentshavinum, sigur fiskimálaráðið.

Norska svartkjaftakvotan í føroyskum sjógvi hækkar 15% svarandi til 1.695 tons, meðan norska botnfiskakvotan í føroyskum sjógvi minkar umleið 200 tons.

Føroyar hava í nógv ár ført fram í samráðingunum, at Føroyar ynskja broytingar í teimum treytum, sum Noreg setur, fyri at flyta fisk úr russiskum sjógvi í norskan sjógv. Sínámillum avtalan fyri 2010 gongur hesum ynski á møti. Semja er gjørd um at broyta avtaluna soleiðis, at tað gjald, sum Føroyar lata Noreg fyri yvirføring av botnfiskakvotunum úr russiskum sjógvi í norskan sjógv verður niðurlagað yvir 3 ár.

Hóast eingin strandarlandaavtala er um makrelin, eru Føroyar og Noreg samd um at halda áfram við sínámillum samstarvinum um makrel. Føroyska makrelkvotan í norskum sjógvi í 2010 verður 2.000 tons, og Noreg kann á sama hátt fiska 2.000 tons av makreli í føroyskum sjógvi.

Eisini avtalan um sínámillum atgongd eftir norðhavssild og svartkjafti, sum á fyrsta sinni varð gjørd í 2009, er endurnýggjað í avtaluni fyri 2010. Føroysk skip kunnu sambært hesari avtalu fiska 30.000 tons av norðhavssild í norskum sjógvi, og norsk skip 40.000 tons av svartkjafti í føroyskum sjógvi.


M/B NÝPAN TIL SØLU



Útróðrarbáturin M/B »Nýpan« VA 217 kallimerki OW2131 tilhoyrandi Sp/f Vesturhavið í likvidatión verður hervið lýst til sølu um hóskandi boð fæst.

Báturin er uml. 12,29 m til longdar, breiður 3,75 m og 0,93 m djúpur. Maskinan er Cummens 210 hk. Báturin er útgjørdur til línu- og snelluveiði og fylgja línir og stampar við. Báturin hevði undanfarna fiskiár fiskiloyvi í bólkinum 5A.

Áhugaði verða at venda sær til

Petur Even Djurhuus, likvidator.

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4
YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR